# UNITED WORLD COLLEGE

At uppliva og gerast partur av einum spennandi og mennandi altjóða undirvísingarumhvørvi! Ja, so hevur tú møguleika at søkja um upptøku á United World College í Dali, sum liggur umleið 100 km norðan fyri Bergen.

United World College Red Cross Nordic (UWC RCN) bjóðar einum føroyskum skúlanæmingi at taka eitt altjóða studentsprógv, kallað IB (International Baccalaureate) á einum altjóða studentaskúla í Dale í Noregi. Treytin fyri at søkja er, at tú á sumri 2024 hevur lokið fyrsta árið í eini 3 ára gymnasialari miðnámsútbúgving,

IB (International Baccalaureate) er ein altjóða gymnasial miðnámsútbúgving, ið tekur 2 ár. Eitt IB prógv gevur somu rættindi innan hægri framhaldslestur, t.e universitet og líknandi, sum eitt føroyskt studentsprógv.

Endamálið hjá UWC RCN-skúlanum er at virka fyri altjóða friði og burðadyggari framtíð. Hetta verður m.a. gjørt við, at næmingar úr umleið 80 ymiskum londum búgva og lesa saman í skúlanum.

Studni rindar skúlagjald umframt gjald fyri innivist í skúlanum. Hetta merkir, at umsøkjari ikki samstundis fær stuðul frá Studna sum útibúgvandi.

Ferð aftur og fram millum skúlan og Føroyar verður goldin sambært galdandi reglum hjá Studna. Upphæddin er í 2025 kr. 3.100.

Nærri upplýsingar um skúlan fært tú við at venda tær til formannin í *UWC Føroyar* á telefon 555037 ella til lestrarvegleiðingina í skúlanum, har tú gongur. Tú kanst eisini finna fleiri upplýsingar um skúlan í Noregi á hesi heimasíðuni: uwcrcn.no/

Upplýsingar um skúlan eru eisini at finna á Facebook.

Umsókn um upptøku á UWC RCN, avrit av seinastu støðumetunum saman við einari frágreiðing um teg sjálva/n, ið skal skrivast í umsóknarblaðinum, skulu umvegis teldupost sendast claus.reistrup@icloud.com í seinasta lagi sunnudagin 2. mars 20245 Upptøkusamrøður við umsøkjararnar verða hósdagin 6. mars 2025, kl 16 í Tórshavn. Fráboðan um staðið verður send umsøkjarunum.

Umsóknarblaðið um upptøku á UWC RCN er at finna á heimasíðuni hjá Vegleiðingarstovuni https://vegleiding.fo/, Reyða Krossi www.reydikrossur.fo, Undirvísingarstýrinum https://undirvising.fo/ og Norrøna Felagnum í Føroyum www.norden.fo.

*Tórshavn, 30. januar 2025*

**UWC Føroyar**